# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 23. apríl 2025, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Sára Jógvansdóttir, Símin Jákup Højsted, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen, Jákup S. Jóanesarson og Janus Atli Jensen.

**Skrivari:** Rúna Koba

---

Áðrenn fundin greiddi Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, er eitt nýtt mál innkomið: klokkuskipanin. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá og viðgjørt fyri afturlatnum hurðum. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 31.

Varð viðgjørt fyri **opnum hurðum**

**Mál 24**
Skráseting av oljutangum til 2. viðgerð
J.nr.: 1303002-4-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 tilmæli frá teknisku nevnd um eykajáttan til skráseting av oljutangum.
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 10. mars 2025 mál um skráseting av oljutangum - tilboð frá Munin uppá skipan til skráseting. Nevndin mælir til at taka av tilboðnum, sum er uppá kr. 34.963 uttan mvg + árligt gjald uppá kr. 6.993, og heitir á fíggjarnevndina um at finna neyðuga fígging.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til eina eykajáttan í 2025 og hækkan av rakstrinum til árliga gjaldið í 2026

Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð á fundi tann 19. mars 2025.

**Viðv. 24**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 25**
Eykajáttan til ljósketu til ymiskt prýði til bygdina til 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 mál um eykajáttan til ymiskt prýði til bygdina.

| | |
|---|---|
| Nýggj ljósketa til stevnur | kr. 100.000 |
| Jólaprýði | kr. 50.000 |

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til eina eykajáttan á kr. 150.000 sum omanfyri lýst.

Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð á fundi tann 19. mars 2025.

**Viðv. 25**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 26**
Eykajáttan til arbeiðir sum ikki blivu liðug í 2024 til 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 mál um eykajáttan til arbeiðir, sum ikki blivu liðug í 2024.

Vestmanna bygdarráð samtykti á fundi tann 30. oktobur 2024 umraðfesting av játtan við 2. viðgerð m.a. til:

| | |
|---|---|
| Asfaltera tún og høvuðsgøtu í kirkjugarðinum á Knúgvum | kr. 300.000 |
| Kloakk í Útibø | kr. 440.000 |

Omanfyri arbeiðir eru farin yvir um ár og mangla sostatt kr. 740.000 á játtanini á fíggjarætlanini fyri 2025.

Á fundinum skeyt Karl A. Olsen upp at broyta navnið á játtanini frá "Kloakk í Útibø" til "Spillvatn" og at hækka játtanina til kr. 600.000. Karl A. Olsen mælti somuleiðis til at samtykkja eykajáttanirnar á kr. 900.000.

Uppskotið hjá Karl A. Olsen varð einmælt samtykt.

Á fundi hjá bygdarráðnum tann 19. mars 2025 greiddi Sàra Jógvansdóttir, borgarstjóri, frá, at kr. 300.000 ikki røkka til at asfaltera túnið í kikjugarðinum á Knúgvum, tann parturin kostar kr. 100.000 aftrat.

Janus Atli Jensen skeyt upp at umraðfesta kr. 100.000 frá gongubreyt í Bøgøtu til túnið í kirkjugarðinum og annars at samtykkja tilmælið frá fíggjarnevndini.

Uppskotið hjá Janus Atla Jensen varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Viðv. 26**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 27**
Eykajáttan til søluskúr við bátahylin
J.nr.: 8206002-1-2025

Vinnu- og havnanevndin viðgjørdi á fundi 1. apríl 2025 málið um søluskúr við bátahylin.
Nevndin mælir til eina eykajáttan á kr. 400.000 til skúrin.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt á fundi tann 9. apríl 2025 at mæla til at samtykkja eina eykajáttan á kr. 400.000.

**Viðv. 27**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 28**
Eykajáttan til kommunulæknamiðstøðina
J.nr.: 8216002-5-2025

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 9. apríl 2025 mál um eykajáttan til kommunulæknamiðstøðina.

Vísandi til Løgtingslóg um kommunulæknaskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2015. **Kapittul 3, § 6.** Kommunan útvegar frían bústað til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

Umsitingin gjørdi fíggjarnevndina varuga við, at kommunan ikki hevur rakstrarkonto til íbúð til kommunulæknan. Upphæddin til leigu av íbúð skal á rakstrarkonto 163000 (langtíðarleiga og leiga annars) – har er ongin játtan nú.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at gera tilmæli til bygdarráðið um at samtykkja eina eykajáttan á kr. 120.000 til rakstrarkonto, sum omanfyri lýst.

**Viðv. 28**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 29**
Fyrispurningur í samband við møguliga bygging av sethúsum á matr. nr. 326z.
J.nr.: 20002-3-2025

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 8. apríl 2025 fyrispurning í samband við møguliga bygging av sethúsum á matr. nr. 326z, Grótbrúgv 9.

Spurt verður um møguligt undantak frá takhalli – frá 30 stigum, sum serstaka byggisamtyktin fyriskrivar, til 45 stig.

Av tí, at hæddin er innanfyri ásetingina í byggisamtyktini, og broyting av takhallinum ikki ávirkar útsýnið frá húsum omanfyri, mælir nevndin til at ganga fyrispurninginum á møti.

**Viðv. 29**
Tilmælið frá teknisku nevnd varð einmælt samtykt.

Varð viðgjørt fyri **afturlatnum hurðum**

**Mál 30**
Áheitan á kommununa um matr. nr. 326aa, Grótbrúgv 11.
J.nr.: 8201002-1-2025

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 8. apríl 2025 áheitan á kommununa um at keypa grundstykkið matr. nr. 326aa, Grótbrúgv 11, aftur frá teimum fyri sama prís, tey keyptu tað fyri frá fyrsta eigaranum.

Ein minniluti í nevndini, Símin Jákup Højsted, mælir til at keypa grundstykki aftur fyri sama prís, eigarnir keyptu tað fyri frá undanfarna eigara.

Ein meiriluti í nevndini, Janus A. Jensen og Jákup S. Jóanesarson, mæla til, at kommunan bjóðar sær til at keypa stykkið aftur fyri prísin, sum kommunan upprunaliga seldi stykkið fyri. Um eigarnar ikki vilja tað, so at geva teimum loyvi til sjálvi at selja grundstykkið fyri sama prís, tey keyptu tað fyri.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt á fundi tann 9. apríl at beina málið fyri bygdarráðið til støðutakan.

**Viðv. 30**
Bygdarráðið atkvøddi um uppskotið frá minnilutanum í teknisku nevnd.

> Sìmin Jákup Højsted og Pauli Magnussen atkvøddi fyri uppskotinum.
>
> Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Jákup S. Jóanessarson og Janus Atli Jensen atkvøddu ímóti uppskotinum.

Bygdarráðið atkvøddi um uppskotið frá meirilutanum í teknisku nevnd.

> Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Jákup S. Jóanessarson og Janus Atli Jensen atkvøddu fyri uppskotinum.
>
> Símin Jákup Højsted og Pauli Magnussen atkvøddi ímóti uppskotinum.

Tilmælið frá meirilutanum í teknisku nevnd varð samtykt.

Varð viðgjørt fyri **opnum hurðum**

**Mál 31**
Klokkuskipan
J.nr.: 8301022-1-2025

Í 2015 heitti Vestmanna bygdarráð á fíggjarnevndina um at fáa klokkuskipan innførda til øll starvsfólkini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. mars 2015 tilboð frá NEMA upp á klokkuskipan og samtykti at taka undir við, at klokkuskipan verður innførd hjá Vestmanna kommunu, og at fíggingin verður játtað av játtanini hjá umsitingini.

Bygdarráðið varð á fundi tann 23. novembur 2015 kunnað um, at skipanin verður tikin í brúk frá 1. januar 2016.

Í 2024 hevur umsitingin umrøtt skipanina. Metingin er, at klokkuskipanin ikki altíð er skilabesta loysnin, men krevur eyka umsitingarligt arbeiði og eyka kostnað tá ið útgerð skal dagførast.

Umsitingin mælir til, at bygdarráðið letur umsitingini fulla heimild til at taka avgerðir um klokkuskipanina.

**Viðv. 31**
Bygdarráðið samtykti einmælt at lata umsitingini heimild at taka avgerðir um klokkuskipanina.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl 18:10

Sign.:

Sára Jógvansdóttir Símin Jákup Højsted Anja Haldansen Karl A. Olsen

Pauli Magnussen Jákup S. Jóanesarson Janus Atli Jensen